ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 29. desember 2009

# Tjaldur missir pengamannin

**Eivind Jacobsen sigur seg hava fingið boð um, at hann er óynsktur í Tjaldri. Avleiðingin er, at hann tekur seg úr nevndini, tá felagið hevur aðalfund í januar mánaði**




Jákup Mørk

Á vøllinum er eingin ivi um, at Adina Petrea og rumensku landsfelagar hennara vóru heilt stóra orsøkin til, at Tjaldur í vár kundi rópa seg føroyameistara í kvinnuhondbólti.

Meistaraheitið var tað fyrsta hjá felagnum, og hetta var úrslit av teirri ætlan, sum varð sett í verk, tá Eivind Jacobsen fyri góðum trimum árum síðani gjørdist formaður í felagnum. Málið var tá fyrst og fremst at vinna felagið upp aftur millum tey fremstu, og síðani at føra Tjaldur upp á ovastu rók. Nakað, sum eydnaðist við meistaraheitinum.

Um finaludystir og steyp eru søga í Tjaldri, er ikki greitt. Men tað tykist greitt, at Eivind Jacobsen er um at vera søga.

Við Kringvarpið segði formaðurin beint undan jólum, at hann hevði fingið at vita, at hann ikki longur er ynsktur í felagnum.

– Eg havi fingið at vita, at eg eri óynsktur í felagnum, og fríggjadagin tók eg avgerðina. Eg eri liðugur við Tjaldur. Eg ynski teimum alt tað besta. Men eg vóni sanniliga, at tað er onkur við nógvum pengum, ið er komin inn ístaðin. Annars steðgar felagið upp rættiliga skjótt, sigur skjótt fyrrverandi formaðurin við Kringvarpið.

### Skal av beinkinum

Ein annar av høvuðsmonnunum í Tjaldri er Niels Peter Bech, sum eitt skifti eisini var formaður í felagnum. Hann segði við Kringvarpið, at tey hava sagt við Eivind, at spælararnir ikki vilja hava hann á beinkinum.

Tær vóru allar samdar um, at tær vildu ikki hava formannin, Eivind Jacobsen, sitandi á bonkinum undir dysti. Tað fekk hann at vita eftir fundin síðsta mánakvøld, og tað var eisini einasta kravið frá teimum. Men Eivind er ikki koyrdur úr felagnum, sigur Niels Peter Bech.



Frøin var stór, tá Tjaldur í vár vann FM-heitið í kvinnuhondbólti. Nú er tó vátt komið í reiðrið millum formannin, Eivind Jacobsen, og restina av felagnum

## Chelsea økti um leiðsluna



Tætt er millum dystirnar í ensku Premier League í hesum døgum. Chelsea spældi leygardagin javnleik móti Birmingham, og longu í gjár var oddaliðið aftur í eldinum.

Her hótti eitt tap móti Fulham, sum eftir bara fýra minuttir legði seg á odda. Og tann støðan helt sær, til gott korter var eftir at spæla.

Tá javnaði Drogba, og bara tveir minuttir seinni gjørdi Fulham sjálvmál, soleiðis at Chelsea aftur fekk økt um munin í oddinum. Har er Chelsea nú fimm stig framman fyri Manchester United, sum mikudagin spælir á heimavølli móti Wigan.

Úrslitini í gjár
Tottenham-West Ham 2-0
Blackburn-Sunderland 2-2
Chelsea-Fulham 2-1
Everton-Burnley 2-0
Stoke-Birmingham 0-1
Wolves-Manchester City 0-3

### Portalurin sendur apríl

Talan var eftir øllum at døma um apríl-søgu í desember, tá portalurin í gjár endurgav útlendskar miðlar fyri at skriva, at ríki Manchester City-eigarin vil keypa Real Madrid.

Í Spania er 28. desember nevnliga dagurin, tá tey senda fólk "apríl", ella inocentadas, sum tað verður rópt har.

Tí var skrivingin um, at Sheikh Mansour Bin Zayed Al Nahyan nú ætlaði sær at keypa sjálvasta Real Madrid, bert ein apríl-søga hjá einum av stóru sponsku bløðunum.

**-mørk**

## Beckham er í HM-myndini

Er David Beckham nóg væl fyri, so er hann sjálvskrivaður í enska HM-hópinum, sigur Fabio Capello.

Italski landsliðsvenjarin hjá Onglandi hevur áður sagt, at hann hevur mest sum gjørt av, hvørjir spælarar mann HM-hópin hjá Onglandi.

Og nú sigur hann, at David Beckham avgjørt telist millum teir, sum hann ætlar sær at hava við til Suðuarafrika.

- Sjálvandi er hann tað. Spælir hann væl og er hann væl fyri kropsliga, so skal er hann við í hópinum. Eg hugsi ikki um aldurin, tá eg taki hópin út. Eg hugsi um kvalitetir, og hesum hevur Beckham ovmikið av, sigur Fabio Capello við blaðið Gazzetta dello Sport.

Eins og hann var tað í vár, so er David Beckham í løtuni leigaður frá LA Galaxy til AC Milan. Fyrst og fremst, tí spælarin sjálvur ynskir at hava bestu fortreytirnar at fyrireika seg, so hann er aktuellur til HM-hópin.